# Tóra fegin um at tað gekk væl

**– Alt gekk, sum tað skuldi, og tað eri eg sera glað fyri, sigur Tóra við Keldu, sum gav beiggja sínum eina hjálpandi rødd í Grand Prixnum**



*– At vit komu víðari til finaluna var stuttligt, men eg eri als ikki kedd fyri tað, um vit endaðu nummar fimm. Alt riggaði væl hjá okkum, og tað var tað týdningarmesta, sigur Tóra við Keldu*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

GRAND PRIX
*Eyðun Klakstein*

**Keypmannahavn:** Leygarkvøldið stóðu Pætur og Tóra við Keldu á pallinum í Cirkusbygninginum, har danska Grand Prixið var hildið. Tey hava sungið nógv saman áður, men hetta var ein heilt onnur støða.

Nú ráddi tað um at syngja fyri tveimum milliónum dønum, sum fylgdu spentir við í sjónvarpinum, og tað var ein stór uppgáva

– Eg eri sera glað fyri, at tað gekk so væl hjá okkum. Eg helt, at serliga seinnu ferðina riggaði tað væl hjá okkum, segði Tóra, tá kappingin var av leygarkvøldið.

– Eg hugsaði als ikki um, at so nógv lurtaðu og hugdu eftir okkum. Vit sóu tey fólkini, sum sótu úti í salinum, og tað var fyri teimum, at vit fyrstu og fremst royndu at syngja.

## Einki vónbrot

Tóra sang eina av kórróddunum í sanginum. Hon er von við at syngja saman við Pæturi, og hesaferð riggaði tað eisini sera væl hjá teimum. Musikalsku systkini svingaðu væl saman.

– Tað var stuttligt at vera við í Grand Prixnum, og eg kláraði at njóta hvørja løtu, tað vardi, segði Tóra, sum heldur ikki fór niður við høvdinum, hóast tað ikki eydnaðist teimum at vinna.

– At vit komu víðari til finaluna var stuttligt, men eg eri als ikki kedd fyri tað, um vit endaðu nummar fimm. Alt riggaði væl hjá okkum, og tað var tað týdningarmesta, helt Tóra.

## Danska Grand Prixið 2002

| | | |
|---|---|---|
| 1. Malene W. Mortensen | Vis mig hvem du er | 64 |
| 2. Luna Park | Sommerregn | 52 |
| Neighbours | Alt mellem himmel og jord | 52 |
| 4. Morten Fleck | Alle dage er en fredag | 42 |
| 5. Pætur við Keldu | Som en drøm | 30 |

Hinir sangirnir:

| | |
|---|---|
| U.F.O | Mon du falder ned? |
| Jeanett Debb | Medieshow |
| Bjarne Langhoff | Det' på tide |
| Tine B. | Helt derinde |
| Mads Broe Andersen | Aldrig mig igen |


Eysturoyar Javnaðarfelag

**Uppstillingarfundur**

2. og møguliga 3. uppstillingarfundur, ið lýstur var at verða mánadagin, verður í staðin týsdagin 12. februar kl. 20⁰⁰ í hølinum hjá Stranda Centrum, Strendur.

Við á fundinum vera Dan R. Petersen og Katrin Dahl Jacobsen

**Nevndin**







*Vinnarin av Grand Prixnum, Malene W. Mortensen*



# Favoritturin vann

**Eftir aðalroyndina í Grand Prixnum fríggjakvøldið peikaðu tey flestu á Malene W. Mortensen sun vinnara. Og hon vann sannførandi**



*Tað er deiligt, men eisini eitt sindur undarligt at vinna, segði Malene W. Mortensen eftir sigurin*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

GRAND PRIX
*Eyðun Klakstein*

**Keypmannahavn:** Favoritturin í danska Grand Prixnum gjørdist vinnari.

19 ára gamla Malene W. Mortensen var tann seinasta í røðini, og danir vóru als ikki í iva um, at hon skuldi vinna. Hóast dómarapanelið gav sanginum vánaligt skoðsmál, var støðan hjá dønum ein heilt onnur.

Kring alt landið peikaðu fólk á Malene W. Mortensen, og tað verður tí hon, sum skal umboða Danmark í europeisku finaluni í Talinn í mai mánaði.

– Tað er deiligt, men eisini eitt sindur undarligt at vinna. Eg var gjørd til favoritt í kappingini, og tað legði meira trýst á meg, segði Malene W. Mortensen eftir sigurin. Hon tóktist vera tikin á bóli av øllum hóvastákinum, sum varð gjørt burturúr.

## Nógv talaði fyri

Donsku fjølmiðlarnir sum vóru til royndina fríggjadagin, gjørdu í leygardagsbløðunum Malene til favoritt. BT hevði gjørt eina kanning millum fólk eftir royndina, og úrslitið av henni var púra greitt. Malene fór at vinna.

Sangurin Vis mig hvem du er var passaliga lívligur, niðurlagið var fangandi, hann ljóðaði nøkunlunda modernað, og so var sjarmerandi sangarin eisini við til at betra um støðuna.

Malene W. Mortensen endaði næstfremst í eini tónleikakapping fyri ungfólk, sum hevur verið send í donskum sjónvarpi herfyri, men hesaferð var hon vinnarin, meðan tann, sum vann áðurnevndu kappingina, slapp at syngja í einum av steðgunum í Grand Prixnum. Soleiðis kann alt venda upp og niður við hvørt.

Vinnandi sangurin er longu týddur til enskt, og á enskum skal hann eita Tell me who you are. Tá sangskrivarin hitti pressuna eftir Grand Prixið ognaði hann Prins Heindrikki sangin.

Misnøgdur danskur ummælari:

# – Pætur var best

**Ummælarin á Politiken, sum finnist harðliga at støðinum í Grand Prixnum, heldur, at sangurin hjá Pæturi við Keldu var nógv tann besti. Vinnandi sangskrivarin heldur, at Pætur syngur inniligt og erligt**

GRAND PRIX
*Eyðun Klakstein*

**Keypmannahavn:** Tað eru ikki mjúk orð, tónleikaskribenturin á danska dagblaðnum Politiken hevur at bera Grand Prix kappingini, men hann hevði rósandi orð til føroyska luttakaran í kappingini.

– Sangurin hjá Pætur var klárt tann besti. Ein flott lag og framúr væl sungið og spælt. Pætur er fantastiskur, segði Erik Jensen, tá danska Grand Prixið var av leygarkvøldið.

– Tú hoyrir, at tað er dygd í sanginum hjá Pæturi. Sangurin er øðrvísi enn vanligir Grand Prix sangir, og tað ger eisini, at hann kann ikki vinna. Eg var eitt sindur kløkkur av, at sangurin kom víðari til finaluumfarið, tí tað hevði eg ikki roknað við, sigur hann.

## Brúk fyri meira tíð

Erik Jensen heldur, at stilli sangurin hjá Pæturi er ikki tað slagið av tónleiki, sum plagar at vinna danska Grand Prixið. Danir vilja hava okkurt, har tað er meira lív í.

– Sangurin hjá Pæturi hevur brúk fyri eitt sindur meira av tíð, enn hann kann fáa í Grand Prixnum. Men hann blívur bara betri, og mín hugsan er, at hetta er tann besti sangurin í ár, sigur Erik Jensen.

– Pætur skal vera væl nøgdur við sítt avrik. Hann kláraði seg sera væl á pallinum, framførslan var góð, og hann gjørdi gott inntrykk.

Erik Jensen hevði annars ikki nógv positiv orð at bera danska Grand Prixnum, sum hann heldur er blivið keðiligt og vánaligt. Hesa misnøgd brúkti hann nógv pláss til í Politiken sunnudagin.

## Erligt og inniligt

Maðurin, sum skrivaði vinnandi Grand Prix sangin í ár, var Michael Ronson, og honum dámdi eisini væl sangin hjá Pæturi.

– Pætur er inniligur og erligur, tá hann syngur, og tað dámar mær væl at síggja. Nógvir av sangunum tykjast at vera framleiddir til eitt ávíst konsept, men sangurin hjá Pætur virkaði ómetaliga inspireraður og erligur, sigur Michael Ronson, sum er ættaður úr Rumenia.

Í fjórðu royndini í Grand Prixnum eydnaðist tað honum umsíðir at vinna, og tað var hann sera fegin um.

– Eg haldi, at sangurin hjá mær vann, tí tað var eitt gott lag, og so var tónleikurin passaliga lívligur og spennandi. Hetta er ómetaliga stuttligt, segði glaði vinnarin.



*– Sangurin hjá Pæturi hevur brúk fyri eitt sindur meira av tíð, enn hann kann fáa í Grand Prixnum. Men hann blívur bara betri, og mín hugsan er, at hetta er tann besti sangurin í ár, sigur Erik Jensen, ummælari á Politiken*
*Mynd: Jens Kristian Vang*